# Tannlækni

Við hesum verður søkt eftir tannlækna til tannlæknastovuna á Skála, at byrja 1. januar 2006 ella skjótast gjørligt eftir hendan dag.

Á tannlæknastovuni verða árliga viðgjørd uml. 500 børn og ung millum 0 og 16 ár.

Lagdur verður stórur dentur á dygd, góða tænastu og góð samstarvsevni.

Løn og setanartreytir sambært galdandi sáttmála.

Øll viðgerð fer fram á væl útgjørdu tannlæknastovuni á Skála, har tveir klinikkassistentar eru í starvi, ein fulla tíð og ein hálva tíð.

Sambært leigusáttmála millum tannlæknan og kommununa, fær tannlæknin fullan nýtslurætt yvir tannlæknastovuni, sum harvið eisini gevur møguleika til privata praksis.

Eftir nærri avtalu við núverandi tannlækna, er møguleiki fyri at yvirtaka hansara privata praksis.

Um tygum vilja hava fleiri upplýsingar, eru tygum vælkomin at venda tygum til borgarstjóran Rodmund Nielsen á tlf. 417000.

Umsóknir við viðkomandi upplýsingum skulu sendast til:

Runavíkar Kommunu
Postsmoga 139
Heiðavegur 26
600 Saltangará

att. Rodmundur Nielsen, borgarstjóri

í seinasta lagi 21. november 2005.

**Runavíkar kommuna**

---

## FØROYA FELAG MÓTI KRABBAMEINI

### HUGNALØTA VIÐ FYRILESTRUM

BÓT TIL BATA SKIPAR FYRI
HUGNALØTU VIÐ ALMENNUM
FYRILESTRUM Á HOTEL HAFNIA

Eliesar Olsen, yvirlækni á Landssjúkrahúsinum, heldur fyrilestur um skurðviðgerð av bróstkrabba. Eisini fer hann at røða um nýggjastu viðgerðarhættirnar og um møguleikar fyri at varðveita bróstini umframt endurnýggjan ella endurgerð av skurðviðgjørdum brósti.

Inga Poulsen Dam, prestur, heldur fyrilestur um lívsdygd í sambandi við lívshóttandi sjúku

Paula Jespersen úr sangbólkinum SALT fer at syngja og Arnvør á Torkildsheyggi spælir undir

HUGNALØTAN VERÐUR
Á HOTEL HAFNIA
LEYGARDAGIN 29. OKTOBER KL. 15.00
ØLL ERU HJARTALIGA VÆLKOMIN

BÓT TIL BATA

FØROYA FELAG MÓTI KRABBAMEINI

---

# Arkitektur/ Byggifrøðingur

Søkt verður eftir einum arkitekti/byggifrøðingi.

Arbeiðsuppgávurnar umfata um- og nýbyggingar, har Teknistovan veitir ráðgeving fyri almennar og privatar byggiharrar, alt frá programskrivum, skitsu- og høvuðsprojekteringum til eftirlit og avhendan av bygningum og økjum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal í minsta lagi hava 3 ára praktiskar royndir frá líknandi arbeiði, skal hava góð samstarvsevnir og eisini duga at arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskiftir**
Løn- og setanartreytir verða eftir nærri avtalu.

Umsókn við avriti av prógvi, CV ogmøguligum viðmælum skulu vera inni áðrenn 15. november 05.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og sendast til:

**Teknistovan**
v/ Eyðun Petersen, arkitektur
Torvgøta 1 · 600 Saltangará
Tlf. 44 80 05 · Far 28 00 00 · Fax 44 80 50

---

## AÐALFUNDUR HJÁ FØROYA-MC

Motorsúkklufelagið Føroya-MC hevur ársaðalfund leygardagin 12. november kl. 17.00 á **Fjørukrónni í Vestmanna.**

Skrá sambært viðtøkum felagsins.
Uppskot skulu vera formanninum í hendi seinast 8 dagar áðrenn fundin.

**Nevndin**

---

# Húsarhaldsskeiðið 2006

Frá mánadegnum 31. oktober kunnu tey, ið ætla sær á húsarhaldsskúla í august 2006 fáa tilsent tilmeldingarblað við at venda sær til skúlan á tlf. 45 69 74 ella melda seg til umvegis heimasíðuna www.husarhaldsskulin.fo

**Húsarhaldsskúli Føroya**
**Stoksoyrarvegur 29, 700 Klaksvík**
*t-postur hsf@post.olivant.fo-www.husarhaldsskulin.fo*
*tlf. 45 69 74*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 4058**
**Navn:** Sp/f Vit 4
**Adressa:** Mykinesgøta 5 100 Tórshavn
**Kommuna:** Tórshavnar
**Stovningardato:** 29-09-2005
**Viðtøkudato**: 29-09-2005
**Stovnarar:**
Edith Dahl Jensen, Tvørgøta 8, 100 Tórshavn
Tórður Patursson, Í Lágabø 4, 175 Kirkjubøur
Poul Johannes Clementsen, Á Heygnum Mikla 8, 100 Tórshavn
Høgni Heinesen Jacobsen, Tvørgøta 21, 100 Tórshavn
**Stjórn:**
Edith Dahl Jensen, Tvørgøta 8, 100 Tórshavn, (stjóri)
Tórður Patursson, Í Lágabø 4, 175 Kirkjubøur, (stjóri)
Poul Johannes Clementsen, Á Heygnum Mikla 8, 100 Tórshavn, (stjóri)
Høgni Heinesen Jacobsen, Tvørgøta 21, 100 Tórshavn, (stjóri)
**Grannskoðari:**
Sp/f SPEKT, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn
**Partapeningur:** kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Tekningarreglur:**
Smápartafelagið verður bundið við undirskriftum av tveimum stjórum saman.
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga, keypa og selja og umsita parta- og ella smápartabrøv í øðrum feløgum, herundir partabrøv í P/F Team 85 (skrá.nr.790) og annað virksemi í hesum sambandi.
**Roknskaparár:** 01.01 - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:**
29.09.2005 - 31.12.2006

*Skráseting Føroya*
*tann 27. oktober 2005*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 4061**
**Navn:** Sp/f Klips
**Adressa:** Helnabrekka 11 700 Klaksvík
**Kommuna:** Klaksvíkar
**Stovningardato:** 12-10-2005
**Viðtøkudato:** 12-10-2005
**Hjánøvn:** Sp/f Háfjall (Sp/f Klips), Sp/f Ravnagil (Sp/f Klips)
**Stovnarar:**
Símun Jógvansson á Høvdanum, Helnabrekka 11, 700 Klaksvík
**Stjórn:**
Símun Jógvansson á Høvdanum, Helnabrekka 11, 700 Klaksvík, (stjóri)
**Grannskoðari:**
P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 110 Tórshavn
**Partapeningur:** kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil, umboðan, bókhald, at eiga partabrøv og annað starv í hesum sambandi.
**Roknskaparár:** 01.01 - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:**
12.10.2005 - 31.12.2006

*Skráseting Føroya*
*tann 27. oktober 2005*
*Kristin Balle*

---

**Almanna- og heilsumálaráðið**

# 2 Løgfrøðingar til Almanna- og heilsumálaráðið

Tvey størv sum løgfrøðingur í Almanna- og Heilsumálaráðnum eru leys at søkja.

Møguleiki er hjá løgfrøðingum og samfelagsfrøðingum at søkja, eisini teimum, ið eru um at verða liðug við útbúgving sína.

Umsóknarfreistin er 11. november 2005, kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið, við at fara inn á heimasíðu okkara: www.ahr.fo, har nágreinilig lýsing stendur.

---

LEIGA
AMBOÐ
&
MASKINUR

Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00